STUTT SAGT

## Yvirgangsfólk høvdu samband við Danmark

Kanadiska ákæruvaldið hevur nú skuldsett 12 av teimum 17, sum vórðu handtikin í einum stórum átaki um vikuskiftið. Nøkur teirra eru skuldsett fyri at hava vant yvirgangsmenn, og nøkur eru skuldsett fyri at hava verið við til at leggja ráð um atsóknir, sum skuldu kosta mannalív. Sambært løgregluni eru fimm av teimum skuldsettu yngri enn 18 ár.

Kanadisku handtøkurnar vaktu ans í Evropa og serliga í Norðurlondum, tí leygardagin kunngjørdi kanadiska løgreglan, at nøkur av teimum tiknu hava havt samband við fólk í Danmark og Svøríki. Harumframt hava tey verið í sambandi við fólk í USA, Bretlandi, Bosnia og Bangladesh. Danskir myndugleikar hava higartil sýtt fyri at vátta kanadisku upplýsingarnar.

Kanadiska løgreglan sigur, at átakið ímóti yvirgangi er ikki liðugt enn, og at tað kann væl hugsast, at fleiri verða tikin afturat.

## Flogvinnan missir pengar



*Flogfeløgini hava spart nógv, men bensinið er ov dýrt*

Hóast altjóða flogfeløgini siga, at tað gongur tann rætta vegin fíggjarliga, benda tey nýggjastu tølini á, at enn er langt á mál.

Altjóða loftferðslufelagsskapurin IATA sigur, at í ár fara flogfeløgini at hava einar tríggjar milliardir dollarar í halli, og tað er næstan ein milliard dollarar meiri, enn IATA metti fyri bara tveimum mánaðum síðani. Aðalstjórin, Giovanni Bisignani, sigur, at tað gongur framá, men ásannar samstundis, at enn er langt á mál.

Tað er serliga tann høgi oljuprísurin, sum kemur loftferðsluni illa við, og tí hava flogfeløgini fíggjarligar trupulleikar, sjálvt um hin parturin av rakstrinum er vorðin munandi bíligari tey seinastu árini orsakað av ymsum sparingum, sigur IATA.

## Skulu læra norskt

Fremmandafólk í Noregi, sum sýta fyri at læra síni børn at tosa norskt, skulu missa rættin til at ala børnini upp.

So langt er tann høgrasinnaði Framburðsflokkurin til reiðar at fara fyri at noyða tey fremmandu at laga seg til tað norska samfelagið. Ulf Erik Knudsen, sum er talsmaður hjá flokkinum í innflytaramálum, sigur við Aftenposten, at í veruleikanum er tað ágangur ímóti børnunum, tá foreldrini sýta fyri at læra tey norskt, áðrenn tey fara í skúla. Tey svíkja sína skyldur, sigur hann.

Tað er kortini lítið, sum bendir á, at Framburðsflokkurin fær undirtøku fyri sínum kravi. Talsfólk hjá hinum flokkunum siga við Aftenposten, at tey flestu foreldur vilja sínum børnum ta besta, og at uppskotið hevði ikki gjørt tað lættari at innlima tey fremmandu í tað norska samfelagið.

## Flogskiparin doyði

Ein 61 ára gamal amerikanskur flogskipari megnaði at seta flogfar sítt á ein motorveg í statinum Utah, eftir at hann hevði fingið trupulleikar við hjartanum. Stutt eftir doyði hann á sjúkrahúsi, men soleiðis eydnaðist tað honum at bjarga hinum trimum, sum vóru í flogfarinum.

AP-tíðindastovan skrivar, at Jack Francis, kona hansara og eini onnur hjún vóru á veg til hús í einum flogfari av slagnum Cessna gjáramorgunin, tá Jack brádliga fekk trupulleikar við hjartanum. Tá flogfarið var komið at standa á motorvegnum, varð flogskiparin alt fyri eitt fluttur á eitt sjúkrahús har nærhendis, men løtu seinni doyði hann.

Løgreglan í Utah sigur, at flogfarið rakti girðingina, sum er fram við motorvegnum, áðrenn tað steðgaði, men kortini fekk eingin av hinum trimum nakran skaða.

UTTAN ÚR HEIMI

# Al-Qaeda ræður í Somalia



*Hermenn hjá Islamsku rættarsamgonguni á varðhaldi í Mogadishu*

**Ein rørsla, ið líkist Taliban, hevur tikið valdið í somaliska høvuðsstaðnum Mogadishu. Ætlanin er, at Somalia verður høvuðsstøð hjá al-Qaeda**

YVIRGANGUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í 15 ár hevur lógloysi valdað í afrikanska landinum Somalia, har krígsharrar hava stríðst um valdið. Tær seinastu vikurnar hava bardagarnir verið harðir, men í gjár kunngjørdi ein útvarpsstøð í høvuðsstaðnum Mogadishu, at nú er friður har, eftir at felagsskapurin „Islamska rættarsamgongan" hevur rikið krígsharrarnar úr býnum.

Men hvør er hesin felagsskapur? Vesturlendskar keldur siga, at felagsskapurin hevði sín uppruna í gøtunum í Mogadishu, og at limirnir eru menn, sum høvdu mist alla lívsvón, og sum róku fyri vág og vind í býnum, har teir flestu vóru endaðir sum brotsmenn av ymiskum slagi. AP skrivar, at tað vóru júst slíkir, sum mannaðu Taliban í Afghanistan av fyrstan tíð. Krígsharrarnir, sum hava stríðst ímóti samgonguni, siga, at samgongan fær stuðul frá yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda, og at hon fer at seta tær strongu sharia-lógirnar í gildi í Somalia. Teir vilja eisini vera við, at Somalia skal brúkast sum høvuðsstøð hjá al-Qaeda.

USA hevur illa viljað lagt seg út í stríðið í Somalia, síðani 18 amerikanskir hermenn fullu í Mogadishu í 1993, men amerikanskir tænastumenn siga við AP, at teir nýggju leiðararnir í Somalia verja tríggjar limir í al-Qaeda, sum eru skuldsettir fyri yvirgang. Teir eru millum annað skuldsettir fyri at hava verið við til at spreingja amerikonsku sendistovurnar í Kenya og Tanzania í 1998 og fyri eitt álop á eitt ísraelskt hotell í Kenya í 2002, tá teir eisini royndu at skjóta eitt ísraelskt flogfar niður.

Somalia er eitt sera væl egnað tilhaldsstað hjá einum yvirgangsfelagsskapi. Landið er blóðfátækt eftir áhaldandi stríð, og 43 prosent av fólkinum forvinna minni enn seks krónur um dagin, skrivar AP.

# Nú hevur hann tveir armar



*Jie-Jie var føddur við trimum ørmum*

**Kinesisku læknarnir hava nú tikið ein av teimum trimum ørmunum hjá Jie-Jie**

KINA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Jie-Jie hevði tveir armar vinstrumegin, tá hann var føddur fyri tveimum mánaðum síðani, men í gjár kunngjørdu læknarnir, at teir hava tikið annan.

Í fyrstani ivaðust teir kinesisku læknarnir í, hvønn av teimum báðum armunum teir skuldu taka, men teir valdu tann, sum var nærmast bringuni, tí hann var ikki so búgvin sum hin.

Skurðlæknarnir á barnasjúkrahúsinum í Shanghai siga, at skurðviðgerðin eydnaðist væl, men at nú skal Jie-Jie venja seg til at brúka tann vinstra armin, sum er eftir, og tað fer at taka drúgva tíð.

Kinesisku læknarnir siga, at hetta er ikki fyrstu ferð, at børn eru fødd við tveimum ørmum í aðrari síðuni, men at tann triði armurin hjá Jie-Jie var sjáldsama búgvin.